## Ítróttur ein inngangsvinkul



Oddmar og Line fylgja rímiliga væl við í, hvat hendir heima í Føroyum og Danmark. Tey hava internet og verða javnan dagførd við tíðindum.

- Eg hyggi serliga at ítróttinum. Tað hevur mín áhuga, sigur Oddmar við einum smíli.

- Tað er serliga fótbóltur og motorsportur, sum hevur mín áhuga. Eg fylgi serliga væl við í Formul 1. Eg haldi ikki við nøkrum ávísum koyrara, men mær dámar væl, at teir ungu klára seg væl, sigur Oddmar.

- Ítrótturin er eisini ein góður inngangsvinkul til Ísraelar. Flest øll fylgja væl við í fótbólti, og tað er eitt gott evnið at byrja eina samrøðu við. Tí royni eg at fylgja við toppliðnum í Onglandi og Spania, sigur Oddmar.

# – Útlongsulin størri

**- Eg havi ongantíð havt heimlongsul. Útilongsulin hevur í øllum førum altíð verið størri enn heimlongsulin, sigur Oddmar Steinhólm, sum arbeiðir sum trúboðari í Ísrael. Oddmar hevur verið í starvi í hálvt annað ár, og nú eru hann við konuni og børnunum í Føroyum og heldur summarfrí**



## Trúboðari



**Heini S. Kristiansen**
heinik@sosialurin.fo

Oddmar Steinhólm arbeiðir í Ísrael fyri luthersk-evangeliska felagsskapin Ordet & Israel. Oddmar er giftur við Line, sum er úr Danmark. Tey eiga børnini Tikvu og Jónathan. Oddmar er ungdómsskrivari fyri Ordet & Israel. Hansara uppgáva er at samskipa ymiskt arbeiði, sum tey gera.

Familjan er nú heima í Føroyum í summarfrí. Oddmar hevur havt møtir ymsastaðni og greitt frá arbeiðnum, men annars hava tey vitja familju.

Oddmar og konan fóru til Ísrael at arbeiða í januar 2006. Hetta var tó ikki fyrstu ferð, at tey hava verið í Ísrael. Tey høvdu bæði eitt serligt samband til Ísrael, áðrenn tey hittust.

- Eg havi arbeitt í Ísrael fyrr. Tað var mitt í hálvfemsunum. Tá fekk er veruliga hjarta fara Ísrael, sigur Oddmar.

- Eg var fyrstu ferð í Ísrael í 1999. Tað var eg ikki kristin, og eg fór tí av egnum áhuga. Men í Ísrael varð eg umvend, tí at eg sá, at tað sum Bíblian skrivar um Ísrael, hendir í veruleikanum. Tá visti eg, at eg vildi fegin aftur til Ísrael, sigur Line, sum skilir føroyskt men tosar danskt.

### Hittust í Danmark

Oddmar hevur lisið til pedagog í Danmark. Line hevur lisið hebraiskt á universitetinum í Keypmannahavn. Hon gjørdist ikki liðug, áðrenn hon fór til Ísrael, men hon fer møguliga at gera útbúgvingina lidna seinni.

Tað var eisini í Danmark, at Oddmar og Line hittust.

- Vit tosaðu beinan vegin um Ísrael, tí at vit høvdu bæði verið har. Vit kendu eisini, at vit høvdu sama kall at fara til Ísrael, sigur Line.

### Stór familja

Oddmar er av einari stórari familju. Tey eru 11 systkin, og børnini hava tí nógv systkinabørn í Føroyum.

- Tað er stuttligt hjá Tikvu at heilsa uppá systkinabørnini, tí at hon hevur eingin á mínari síðu. Hon nýtir tað veruliga. Familjan